# Aftur í 60'ini aftur á skránni



*Tað verða sum vant trý orkestur, sum fara at spæla til dans í høllini á Nabb, nú stóra árliga tiltakið Aftur í 60'ini er á skránni. Teir eru Silly Boys, ovara myndin, Thunderbirds, niðara myndin) og Twiligt*



AFTUR Í 60'INI

*Hans Kárason Mikkelsen*

Hetta vikuskiftið stendur stóra dansitiltakið Aftur í 60'ini fyri durum. Vagnur Mikkelsen, samskipari, sigur, at tað er tiltakið sjálvt, sum dregur øll fólkini.

– Tað er ikki so nógv sjálvur tónleikurin, sum er miðdepilin, men meira tað at fólk koma saman at dansa og hugna sær, sigur Vagnur Mikkelsen.

Hetta árið er seytjanda árið, at Aftur í 60'ini er á skránni. Væntandi verða næstan tvey túsund fólk at síggja tilsamans í høllini á Nabb hetta fríggjakvøldið og leygarkvøldið. Vagnur Mikkelsen sigur, at metingin er eini 800 fólk fríggjakvøldið og umleið 1.000 fólk legarkvøldið.

– Eg haldi, at Aftur í 60'ini kanska hevur fingið sama status sum ólavsøkan og allar stevnurnar. Fólk fara á ólavsøku fyri at ganga oman og niðan og heilsa upp á fólk. Tað sama er galdandi, tá fólk fara Aftur í 60'ini, nevniliga hetta her við, at tey koma at dansa og práta við fólk, sigur Vagnur Mikkelsen, samskipari.

Tiltakið er bæði fríggjakvøldið og leygarkvøldið í høllini á Nabb, og byrjað verður klokkan tíggju um kvøldið.












Kent Christensen, sølu- og marknaðarleiðari hjá Atlantic Airways

"Framkomna heimasíðan frá Sansum er týdningarmikil liður í okkara marknaðarføring"

Heimasíðan frá Sansum hevur sera stóran týdning fyri Atlantic Airways. Har sært tú nýggjastu tilboðini, nær flogfør koma og fara, og um tey eru seinkað. Eru tey seinkað, sært tú, nær ið væntað verður, at tey lenda. Á heimasíðuni kanst tú síggja galdandi og komandi ferða-ætlanir. Tú kanst melda teg til Club Atlantic, ið tryggjar tær, at tú fært sendandi sertilboð áðrenn øll onnur. Onkuntíð hava vit selt ferðaseðlar á uppboði. Eisini eru loftmyndir av Føroyum, ið eru tiknar úr tyrlu og flogfari. Tað nýggjasta er, at tú kanst keypa ferðaseðilin á heimasíðuni.

Okkara heimasíða er í veruleikanum tríggjar heimasíður í einum: Har eru ein føroysk, ein donsk og ein ensk. Hesar heimasíður venda sær til hvør sín kundaskara. Heimasíðan er sera løtt at nýta. Ert tú toluliga vanur við teldu, er skjótt at læra at brúka heimasíðuskipanina. Fyri okkum er tað eisini ein fyrimunur, at vit kunnu venda okkum til royndu teknararnar og tekstfólkini hjá Sansum, tá ið arbeiðið at snikka eina síðu saman skal vera serliga væl úr hondum greitt. Vanligar síður geri eg sjálvur ella onkur annar av okkum hjá Atlantic Airways.

SANSIR

Tinghúsvegur 47 | Tel 355 355 | Faks 355 350 | www.sansir.fo | info@sansir.fo